# Føroysk flokssett til miðdeild

**September 2025**




NÁM

Aldudóttir, Silja
**Ódjór (2022)**
Vatnflóð og jarðskjálvtar eru í býnum, men eingin veit hví. Úr sínum loyniliga træi sær Asta rotturnar tysja runt í viðarlundini. Í skúlanum droymir hon um, at takið sorlast niður í høvdið á teimum øllum. Undir asfaltinum og betonginum hóttir ein vera við at leggja allan býin í oyði. Ein dagin stendur Asta andlit til andlits við hana.
Floksstig: 4. – 6.
Síðutal: 156




Blom, Kirsti
**Plastruskið í sjónum (2019)**
Plastruskið í sjónum lýsir, hvussu havið, kovin hjá sjófugli, er um at gerast eitt ruskpláss. Tá ið granskarar kanna deyðar havhestar, sum verða skolaðir upp á land, finna teir plast í maganum á teimum. Soleiðis boðar fuglurin frá, at alt ov nógv plastrusk er í sjónum.
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 46 / 14




Bødker, Cecil
**Hungursbarnið (2005)**
Søgan er um ellivu ára gamla neytadrongin Lárus, sum ein dagin, hann ansar neytunum á almenninginum, kemur fram á Tinku, ið er níggju ár. Hon er foreldraleys og einsamøll, men fram um alt svong og skitin; hon hevur megnað at halda sær á lívi í kroysuni saman við deyðu mammu síni í langa tíð. Lárus gevur Tinku mat og drekka og fær hana við sær heim á garðin, har hann tænir.
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 168




Christensen, Ingun
**Annika í Dímun (2016)**
Søgan byggir á søgnina um Anniku í Dímun, sum var søkt á Havnarvág í 16. øld. Pápi Anniku hevur tapt hana í kortspæli til dímunarbóndan. Annika fer út í Dímun og verður matmóður har. Men hóast hon verður gift, heldur hon á at hava samband við Sjúrð, sum í loyndum vitjar í oynna. Sonur bóndans, Tróndur, er ikki fegin um Anniku, og hann roynir at gera lívið trupult fyri hana.
Floksstig: 5. – 7.
Síðutal: 88




Christensen, Ingun
**Húsfrúgvin í Húsavík (2019)**
Høvundurin hevur skrivað fangandi skaldsøgu um Guðruna Sjúrðardóttur, sum var húsfrúgv í Húsavík og ógvuliga rík. Skaldsøgan Húsfrúgvin í Húsavík byggir lutvíst á hugflog og lutvíst á skjøl, eitt nú húsavíkarbrøvini frá 14. og 15. øld.
Floksstig: 5. – 7.
Síðutal: 90



Christensen, Ingun
**Katrin í Toftum (2018)**
Søgan snýr seg um Katrina, ið finnur eitt silkiband, tá ið hon er í haganum. Eitt kvøldið stendur ein maður í fjósinum og vil hava silkibandið aftur. Men tað vil Katrin ikki. Tá hon varnast, at maðurin er huldumaður, angrar hon, men nú vil huldumaðurin hava meir.
Skaldsøgan byggir á søgn úr Hósvík, sum er um Katrina og huldumannin.
Floksstig: 5. – 7.
Síðutal: 86




---

Christensen, Ingun
**Rani – ein nýggj byrjan (2014)**
Rani flytir út á bygd saman við mammuni og systrini. Foreldrini eru skild, og Rani má byrja av nýggjum og finna sær aðrar vinir. Hetta er ikki lætt, tí at fleiri av floksfelagunum hyggja ikki at honum við blíðum eygum.Tað hevur við sær, at samstundis sum Rani skal berjast við longsulin eftir pápanum og sorgina yvir, at foreldrini eru skild, skal hann eisini stríðast við at fóta sær í nýggjum umhvørvi.
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 79




---

Christensen, Ingun
**Rani – vár og vónir (2015)**
Hóast avgerðin um at skifta fótbóltslið er ring at taka, er Rani spakuliga við at fóta sær í nýggja heimstaðnum og saman við nýggjum vinum. Men honum leingist eftir pápanum, sum er nú er fluttur saman við nýggjari konu og børnum. Tað kann vera trupult bæði hjá honum og systrini at góðtaka. Hetta er framhald av bókini, Rani – ein nýggj byrjan.
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 73




---

Dam, Halldóra
**Lat eisini meg (2013)**
Drós verður illa happað í flokkinum. Hvør dagur er eitt stríð at koma ígjøgnum. Ein dagin kemur ein nýggj genta í flokki, sum torir at taka sjálvstøðugar avgerðir og at velja, hvønn hon vil at vera saman við. Henda gentan og Minomman, sum Drós vitjar, tá vónloysi er størst, verða bjargingin hjá henni. Ein bók við einum sterkum boðskapi um at happing er eitt mál, ið viðkemur okkum øllum.
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 96




---

Erlandsson, Karin
**Perlufiskarin (2020)**
Perlufiskarin fer niður í havdýpini, har perlur syngja á havsins botni. Miranda finnur tær vakrastu perlurnar í havdýpinum og veit, at eygnasteinurin, tann virðismiklasta perlan, sum so nógvar sagnir eru um, kann gerast hennara. Men hvat skal hon gera við Syrsu, sum hon verður noydd at taka til sín, sum sussar alla tíðina, og sum ikki dugir at kava, uttan at sandur fýkur upp av botninum.
Floksstig: 4. – 7.
Síðutal: 244



Fuglø, Edward
**Poetikus (2012)**
Myndabók. Poetikus hevur klaffa fyri eygað og gongur í síðum, svørtum regnfrakka og gummistivlum. Á høvdinum hevur hann ein útsynning. Poetikus sigst vera ein løgin stavnur. Hann býr í einum vita langt burtur frá fólki saman við pappageykinum Sofusi. Tað dámar honum best, men óveðursnætur venda upp og niður á øllum lívinum hjá Poetikusi.
Floksstig: 4. – 6.
Síðutal: 30




---

Fuglø, Edward
**Vampýrella (2011)**
Myndabók. Søgan er um teir báðar beiggjarnar Karl og Knút, sum eru farnir at ivast í, um systirin Ella er sum onnur, ella um hon er ein vampýrur. Knappliga fer Ella at broytast, og beiggjarnir fylgja við í hesi ørkymlandi broytingini, sum fær teir at ógvast við.
Floksstig: 4. – 6.
Síðutal: 31




---

Helmadal, Rakel
**Toran gongur (2023)**
Eitt hús, fýra húski og ein hending, sum broytir alt. Øll í húsinum hava sár á sálini. Ein dagin bjóðar fjúrtan ára gamla Aurora øllum í húsinum til døgurða, og tey taka eitt trilvandi fet inn í lívið hjá hvørjum øðrum. Um náttina gongur toran, so tað buldrar og brakar í húsinum. Morgunin eftir er Sirje horvin – gentan, sum ongastaðni fer einsamøll – og tey mugu øll hjálpast at, um tey skulu finna hana aftur.
Floksstig: 4. – 6.
Síðutal: 150




---

Johansen, Helle Thede
**Lokaða landið (2014)**
Børnunum í 5. B dámar væl í smáttuni á Ternuryggi, men ein dagin síggja tey sigarettstubbar í einari skál á borðinum. Hvør hevur verið har? Tá hetta endurtekur seg mugu tey fara at fáa greiðu á, hvat hetta er. Samstundis fáa børnini ein hvøkk, tí Jóhanna svímar ein dagin, tey eru og svimja. Hon verður innløgd fyri etingarólag, og onkur má hjálpa teimum at skilja, hvat hetta er, og hvussu tey kunnu hjálpa Jóhannu.
Floksstig: 4. – 6.
Síðutal: 80




---

Johansen, Helle Thede
**Vikarurin (2010)**
Flokkurin fær ein danskan vikar, sum hevur verið hermaður í Mjørkadali. Men okkurt undarligt er við honum. Hví roynir hann at fjala okkurt og hví møta tey honum á løgnum støðum?
Hetta er ein øðrvísi upprunaføroysk bók, ið viðger evnið Geocaching.
Floksstig 5. – 6.
Síðutal: 67




---

Johansen, Helle Thede
**Vinurin (2011)**
Bókin er ein spenningssøga. Anna hevur ein kjattvin á netinum og ger av at hitta hann. Einasta, sum veit um hetta, er vinkonan Barbara, sum ikki er heilt álvulig við tankan um, at Anna skal hitta ein, hon ikki kennir.
Floksstig: 5. – 6.
Síðutal: 70




Johansen, Oddvør
**Páll Fangi (2013)**
Tá ið pápi Páll doyr, verður Páll lagdur undir at hava beint fyri honum, tí flýggjar hann og goymir seg. Men Páll verður tikin og settur í Skansan. Hann flýggjar og goymir seg, men verður aftur tikin og settur í Skansan. Hetta er ein nýskrivað søga um Páll Fanga, har høvundurin gevur henni ein nýggjan øðrvísi enda... Søgan byggir á søgnina frá 16. øld.
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 103




Kristín, Steinsdóttir
**Eingil í vesturbýnum (2007)**
Í einum íbúðablokki í vesturbýnum býr Askur saman við mammu síni. Fólk flest halda, at har búgva bara vanlig fólk, men Askur veit betur. Har býr ein varúlvur og Pippi Smokkuleggur og ein veiðimaður og ein silvurfiskur. Jú og so eisini eingilin ...
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 103




Krumbach, Anita
**Eitt løgið skip (2014)**
Elo er sera einsamallur og saknar umsorgan, og tað at verða sæddur. Trupulleikin hjá Elo er, at hann ikki skilir markið millum ov nógv og ov lítið. Elo roynir at sleppa inn í eina familju, sum júst er flutt hagar, hann býr, men hetta endar við, at familjan ger honum greitt, at tey eisini onkuntíð vilja vera fyri seg sjálvi.
Floksstig 5. – 8. Flokk
Síðutal: 55




Lambavík, Sunneva
**Gullleyvan (2022)**
Ein friðaligan dag fara Sára og abbin ein gongutúr í Lamba. Har finnur Sára eina gullleyvu í ánni og vísir abbanum hana. Hann greiðir frá um skipið Norsku Leyvu sum í 1707, kom í eitt ódnarveður og rak inn á Lamba og síðani sakk. Sára er púra bergtikin av søguni um Norsku Leyvu og av dýrgripinum, sum hon hevur funnið.
Floksstig 1. – 4.
Síðutal: 96



Lidbeck, Petter
**Gandakeppurin (2009)**
Tá ið Mostafa, býttlingurin í flokkinum, fær fatur á einum gandakeppi, vendist lív hansara fullkomiliga á høvdið. Knappliga dugir hann at svara øllum spurningum, og eftir einum degi verður hann kendur í sjónvarpi. Men framgongdin hevur sín prís.
Floksstig: 2. – 4.
Síðutal: 115




Lindgren, Astrid
**Brøðurnir Leyvuhjarta (2018)**
Stóribeiggi Skorpuna, Jónatan, fortelur honum um Nangijala, landið, hagar tú fert, tá tú doyrt. Tí Skorpan er lítil og bangin, og fer skjótt at doyggja. "Øll ævintýr koma úr Nangijala, tí tað er í Nangijala, at allar søgurnar fara fram, og tann, sum kemur hagar, sleppur at vera uppi í ævintýrum" segði Jónatan. Tí er tað gott, at Skorpan og Jónatan saman sleppa til Nangijala. Gott, at teir fara at verða Brøðurnir Leyvuhjarta.
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 249




Lindgren, Astrid
**Mio, mín Mio (2017)**
Hjartanemandi søgan um drongin, Mio, sum hvørvur, og sum finnur pápa sín kongin aftur. Bo Vilhelm Olsen hvarv ein dag í oktober. Útvarpið sendi lýsing út um hann fyri at vita, um nakar hevði sæð hann, men ongin visti, hvar hann var farin. Hvat mundi verða av honum?
Hetta er ein ævintýrsøga um 9 ára gamla drongin Bo og hansara upplivingar í "Fjarskotna landinum".
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 180




Lindgren, Astrid
**Ronja ránsmansdóttir (2018)**
Ronja er dóttir ránsmannakongin. Náttina, tá ið Ronja varð fødd, gekk toran í fjøllunum. Ein sonn fyriboðan um, at hetta var eitt heilt sermerkt barn. Ronja er við at gerast vaksin, vil vera sjálvstøðug og ger uppreistur móti foreldrunum – serliga pápanum – tá hon møtir Birk, soni fíggindan. Saman velja tey at venda ránsmanslívinum bakið. Ein klassisk søga um eina sterka gentu við rættvísiskenslu.
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 236




Lund, Naja
**Fríkorter (2008)**
Søga um gentuna Mari, sum hevur hjartasorg og um drongin Kunuk, hvørs foreldur eru skild. Tá ið Kunuk frá sær sjálvum av sorg ætlar at forgera sær, má Mari royna at koma honum til hjálpar, og varisliga spírar vinalag teirra.
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 38



þórarin Leifsson
**Loyndarmálið hjá pápa – bók til børn við kiksaðum foreldrum (2011)**
Pápi hevur eitt loyndarmál – eitt loyndarmál, sum vit bæði, Siri og eg, ikki mugu gretta orð um. Og eitt kann eg siga tær! Tað er verri enn loyndarmálið hjá flest øðrum húskjum – so nógvar ferðir verri! At enda kundu vit ikki halda okkum longur, og tað er tað, henda bókin er um.
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 120




Rasmussen, Steintór
**Søgunámið (2019)**
Stuttsøgurnar nema við stóru spurningarnar í tilveruni. Hvat fólkaræði, ábyrgdarloysi og tolsemi er, og ljós verður varpað á vitleika, einsemi og rúsdrekkamisnýtslu. Evni sum á ein ella annan hátt krevja, at hugsað og prátað verður um tað, sum ein júst hevur lisið. Aðrar av søgunum er ræðslu- og spenningssøgur, sum eru á markinum til at vera hóskandi fyri børn. Samanumtikið djørv evni, sum krevja eitt sindur av lesaranum.
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 130




Rógvi, Elin á
**Flytifuglar (2023)**
11 ára gamla Mai hevur búð í Vestmanna í fleiri ár. Tó er tað ringt at føla seg heima, tí eingin letur hana gloyma, at hon er øðrvísi. Tá eitt barn hvørvur úr einum barnavogni, royna Mai og vinkonan Emma at finna tað. Leitanin tykist vónleys, men knappliga stendur Mai við einum smábarni í ørmunum og má flýggja.
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 132




Rógvi, Elin á
**Fornt (2024)**
Hetta er Fornt! Eitt heimskent telduspæl, sum øll verðin elskar.
11 ára gamli Eiri og vinkona hansara Sólja varnast eina nýggja veru í spælinum, sum eingin nakrantíð hevur sæð fyrr! Brádliga spæla tey millum teir bestu Fornt-spælararnar í heiminum.
Men okkurt er ikki heilt, sum tað sær út til at vera...
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 194




Svingen, Arne
**Ein himmal fullur av skýggjum (2023)**
Hvat ger mann, tá ið mann hevur verið hjá læknanum og fingið verðins ringastu tíðindi? Jú, Henrik ger av at bjarga heiminum. Og hann hevur skund! Men hvussu bjargar mann umhvørvinum á jørðini? Henrik setir tað største og villasta bjargingarátakið nakrantíð í gongd.
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 132



Trenter, Laura
**Dagbókin (2012)**
Krimisøga um Gilbert og Linn, ið royna at loysa gátuna um tey duldarfullu boðini, tey finna á einar oyggj í Vesturindia. Okkurt løgið er við Mick. Gilbert hevur altíð vitað tað. Ikki bara tað, at fyrra kona Mick doyði undir løgnum umstøðum, ella at hann fær løgnar uppgávur - sum til dømis at sigla skip til Vesturindia. Okkurt annað er eisini løgið. Okkurt, sum Gilbert ikki reiðiliga fær sett fingurin á.
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 256




---

Trenter, Laura
**Testamenti (2012)**
Krimisøga. Okkurt sera løgið er í tí at jarða eitt menniskja, tú ongantíð hevur hitt. Gilbert og Linn, eru farin við Gretu til Normandíið at vera hjástødd, tá ið eitt av vinfólkum hennara - Vincent de la Choppe – verður jarðað. Tey steðga eina viku á slotti hansara og varnast skjótt, at alt ikki ruggar rætt.
Floksstig 5. – 8.
Síðutal: 338




---

Wegelius, Jakob
**Ótrúliga søgan um Sally Jones (2016)**
Grafisk skaldsøga. Hetta er ein søga um óloyst brotsverk í fjarum, tokusveiptum býum. Hetta er ein søga um lúnskan óndskap í fepurheitum frumskógum og um trúfast vinalag á brúsandi heimshøvum. Hetta er ein søga um longsul, vónir og nívandi svik.
Floksstig: 4. – 7.
Síðutal: 108




---

Zahle, Oliver
**Fílasteinurin – Tú veitst ikki alt, fyrr enn tú fært tað at vita (2019)**
Bapit býr í Thyborøn og líkist ikki hinum. Tað er tí, at hann hevur etið alt ov nógv Nutella, og tí mamma hansara er úr Tailandi. Pápin, sum er deyður, gav Bapit ein holstein, sum hann segði hevði gandamegi: Um tú hyggur gjøgnum holið og ynskir tær okkurt, gongur ynskið út. Men hesum trýr Bapit ikki. Ikki fyrr enn alt knappliga verður ovboðið.
Floksstig: 4. – 6.
Síðutal: 131




---

Øvreås, Håkon
**Brúni (2015)**
Um dagin er Rúni Rúni, men um náttina er Rúni Brúni - superhetjan, sum ikki er bangin fyri nøkrum. Kann Rúni gera við, at Brúni málar súkklurnar hjá dreingjunum? Ein bók um vinalag, dirvi og um at hevna seg.
Floksstig 4. – 6.
Síðutal: 134




---